# út at koyra



## VW aldarinnar bilur

VW boblan, Fólkavognurin Type 1, er kosin »Århundredets bil« av dønum, sum tann bilur, ið meira enn nakar annar setti hjól undir Danmark. Tað eru 51 ár síðan Skandinavisk Motor Co. innfluttu fyrstu bobluna til Danmarkar. Síðan tá eru seldir 207.714 av slagnum.

**kelda: Bil Snak**



## Rover og BMW

BMW eigur Rover, og teir samstarva um komponentar og sølu. Eisini hevur Rover teknist samstarv við Honda, eins og teir keypa gearkassar frá VW.

**Kelda: Bilen Motor & Sport**

## Ársins bilur í Europa og USA

Ford Focus er fyrsti bilur, sum hevur klárað at blíva ársins bilur bæði í Europa og USA. Nissan Xterra bleiv »Truck of the year« í USA.

**Kelda: FDM/Motor**

# Ford bilverkstaðurin við í tekniskari Hotline skipan

*Við at kobla seg inn á netið hjá Ford fáa teir hjá P/F Wenzel úti í Akranesgøtu í Havn vegleiðing frá Teknisku Hotline skipanini í Svøríki, meðan ein bilur verður testaður*



*Arbeiðshondbókin er skift út við eina berbara teldu. Anhonius er her við at testa ein motor. Vinstrumegin er teldan, sum er ein arbeiðshondbók og høgrumegin er sjálvur testarin. Fyrr vóru motortestarar stórir og tóku nógv pláss á verkstøðunum*

MAGNUS GUNNARSSON

Anthonius Dalsgaard, verkførari hjá P/F Wenzel, greiður frá um eitt nýtt ættarlið av motortestarum. Talan er um WDS (Worldwide Diagnosis System) - ein nýggj global diagnosuskipan - ið er gjørd til at finna feilir í elektriskum og elektroniskum skipanum á Fordbilunum. Grundin til at P/F Wenzel er við í hesari skipan er, at menningin innan hetta økið gongur við rúkandi ferð, og tí ræður um at vera »up to date« alla tíðina.

### Teknisk Hotline miðstøð í Svøríki

Við hesum kunnu teir fara beinleiðis inn á netið hjá Ford og fáa allar uppdateringar so hvørt, sum tær koma. Ford hevur eina tekniska Hotline miðstøð í Svøríki, sum teir hjá P/F Wenzel kunnu koma í samband við. Um teir t.d. kanna eina elektroniska dysu og ivast í, um hon er í ordan, kunnu teir kobla seg inn á netið hjá hjá Ford í Svøríki og fáa at vita, um dysan er í ordan ella um hon má skiftast út. Við hesum er møguleiki fyri at beina burtur ivamál og óneyðuga útskifting av eykalutum, samstundis sum kundin verður spardur fyri óneyðugar útreiðslur.

Tekniska Hotline miðstøðin í Svøríki hevur Skandinavia sum sítt umráði, har Føroyar eru saman við Danmark í hesum sambandi. Tað eru fimm tekniskar Hotline miðstøðir í Evropa við tilsamans 54 starvsfólkum.

### Fyrr næstan eitt dagsverk nú 30 sekund

Ford krevur, at tey sum brúka WDS skipanina skulu kenna til útgerðina og hava royndir innan diagnosuviðgerðina við at finna feilir við bilunum og hava verið á teimum neyðugu skeiðunum. Fyri at lýsa menningina við testútgerðini, teir hava í dag, sigur Anthonius, at fyri umleið 10 árum síðani kundi tað taka út móti einum degi at gera tær neyðugu kanningarnar manuelt, har sama arbeiðið tekur 30 sekund við hesum nýggja testaranum.

Tað verður ofta sagt, at tímalønin á bilverkstøðunum er ov høg, men um vit samanbera við teir, sum arbeiða við teldum, er okkara sera lág, sigur Anthonius.

Hjá P/F Wenzel hava teir eina fastprísskipan við ymiskum prísum fyri hvørt bilmodell.

Starvsfólkini hjá P/F Wenzel fáa ta útbúgving frá Ford, sum krevst, við tí endamáli, at testútgerðin skal koma kundanum til góðar við tað, at umvælingarnar kunnu gerast enn skjótari og bíligari, sigur Anthonius Dalsgaard.

# Volvo FH 12 „Truck of the year 2000“ í Evropa

MAGNUS GUNNARSSON



Á stóru lastbilaframsýninggini í Amsterdam verður Volvo FH 12 kosin til »Truck of the year 2000«. Tískil verður Volvo tað fyrsta bilmerkið, sum hevur vunnið hetta heiti fimm ferðir. Volvo FH 12, ið kom á marknaðin í 1993, vann hetta sama heiti í 1994.

Tann nýggi Volvo FH 12 hevur verið ígjøgnum eina umfatandi produktmenning, og bilurin hevur í dag eina nýggja elektronikskipan. Eisini hevur FH 12 fingið skivubremsur og EBS (Electronic Brake System).

Fleiri bilbløð í Europa hava víst á, at Volvo FH 12 er serstaka lættur og tryggur lastbilur at koyra í. Við at keypa hendan bilin fær eigarin ein bil, sum er bíligur í rakstri, og liggur heilt í topp eftir evropiskum standardi, skrivar dómsnevndin hjá »Truck of the year« í teirra meting.

– Vit eru ernir av, at FH 12 aftur hevur vunnið tittulin »Truck of the year« Hetta prógvar, at vit arbeiða við teimum røttu kundavirðunum, sigur konsernstjórin hjá Volvo Lastvagnar AB í einari viðmerking.

– Fram um alt eru tað okkara kundar, sum vit ynskja skulu verða teir veruligu vinnararnir, teir sum hvønn dag skulu skulu gera eitt arbeiði og samtíðis hava fult álit á Volvo FH12 lastbilinum, sigur hann.

**Kelda: Volvo lastvogne og Busser Danmark A/S**



# út at koyra



*Punto er tann bilurin hjá Fiat, sum gevur stórst fíggjarligt avkast. Spaghetti í grýtuna, ella smør á borðið, sum vit siga, hjá teimum yvir 200.000 starvsfólkunum, sum fáa sína dagligu útkomu frá Fiat*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

# Nýggjur Punto á hundrað ára degnum hjá Fiat

MAGNUS GUNNARSSON

Eftir fimm árum sum ein av mest seldu bilum í Europa, er ein nýggjur Fiat Punto komin á markanðin. Tað var ikki av tilvild at, Fiat Punto var klárur at vísa fram á hundrað ára føðingardegnum hjá Fiat, tann 11. juli í 1999. Punto er tann bilurin hjá Fiat, sum gevur stórst fíggjarligt avkast. Spaghetti í grýtuna, ella smør á borðið, sum vit siga, hjá teimum yvir 200.000 starvsfólkunum, sum fáa sína dagligu útkomu frá Fiat.

### Servostýring til býkoyring

Nú líkjast Punto við 3 og 5 hurðum ikki heilt, nakað, sum Fiat Bravo og Brava. Tann við trimum hurðum er meira sportligur, meðan tann við fimm hurðum er familjubilurin. Við at seta seg í bilin merkist beinanvegin, at kvaliteturin innan er betur, og trygdin livur upp til tað besta, kappingarneytarnir kunnu bjóða.

Bilurin er nakað størri enn forgangarin. Síðuairbag er standard, eins og 3 nakkapútur aftan. Punto hevur elektriska servostýring, har man við at trýsta á knøttin »city« kann gera servostýringina lætta til býkoyring. Tá ferðin økist, verður stýringin tyngri og fastari.

Tann nýggi Punto er lutfalsliga hart avfjarðaður, hevur gott vegtak og er stúttur í svingum orsaka av, at undirvognurin er broyttur við nýggjum upphangi aftan.

### Nógvir motorar í at velja

Forlyktirnar kunnu stillast til at lýsa í 30 sekund, eftir at lykilin er tikin úr startlásinum. Hetta er ein góð hjálp til at finna veg inn til húsini í myrkri.

Standard útgávan er Punto S við el-servostýring, Blaupunkt radio við kasettuspælara og 4 hátalarum. ELX hevur t. d. el-rútar framman og sentrallás.

HLX hevur harafturat luksusinntrekk, lakkerað elspegl við varma, tokulyktir (innan fyri lyktaglasið í forlyktunum) og fjarstýrt sentrallás. Umframt hesar útgávurnar fæst bilurin eisini í Sporting, HGT og 1.9 JTD.

Fiat Punto fæst við 1.2 ella 1.8 bensinmotori og einum 1.9 Common Rail dieselmotori. Annar av 1.2 motorunum hevur 60 hk. við 8 ventilum, hin 1.2 motorurin hevur 80 hk. og 16 ventilar. Punto við 80 hk. fæst eisini við 6 gearum.

Gearskiftið virkar lætt og kompakt. Fiat eru kendir fyri at duga væl at gera smáar bilar, og hesin er onki undantak.



*Í samband við 100 ára føðingardagin fáa Fiat bilarnir eitt búmerki, sum líkist mest tí frá 1931. Navnið Fiat stendur fyri »Fabbrica Italiana de Automobili Torino«*

## Fiat Punto S

| | | |
|---|---|---|
| **Motorurin:** | 1.2 ccm. 4 syl. 8V 60 hk. | |
| **0-100 km/t:** | 14,3 sek. | |
| **Trekk:** | Framman | |
| **Dekk:** | 165/70-14 | |
| **Bremsur:** | Skivur framman/ trumlur aftan | |
| **Stødd og vekt:** | | |
| | 3/h | 5/h |
| **Longd:** | 380,0m | 383,5m |
| **Breidd:** | 166,0m | 166,0m |
| **Hædd:** | 148,0m | 148,0m |
| **Eginvekt:** | 825kg | 825kg |
| **Viðføn̈srúm:** | 264 litrar | 297 litrar |
| **Bensinnýtsla:** | 17,5 km/l | 17,5 km/l |
| **Prísur:** | 132.600 | 136.600 |

***Søluumboð:***
***Bilfríðkan***
***Smiðjugerði***
***FO-110 Tórshavn***



